gult cyan magenta svart

Springarar vi› Leynasand

Um vikuskifti› fekk løgreglan í Havn bo› um, at ta› var grindabo› í Nor›streymoy. Men tá til stykkis kom var eingin grind.

Talan var um springarar, og tí fekk hon loyvi› til at svimja sín egna sjógv.

st

Fer›sluóhapp vi› Áirnar

Løgreglan í høvu›sstа›num hev›i eitt av teimum fri›arligu vikuskiftunum

Løgreglan í Havn hev›i ikki stórvegis at takast vi› hetta vikuskifti› skilst á vakthavandi.

Okkurt smávegis fer›sluóhapp og okkurt herverki› men annars ikki stórvegis.

Hesin bilurin, sum myndama›ur okkara fanga›i tí›liga mánamorgunin, er farin út av leygardagin, men av tí, at eingin fólkaska›i stó›st av óhappinum var ikki meira gjørt vi› máli frá løgregluni, sigur vakthavandi.

st

Púra fri›arligt í Klaksvík

Hóast heilt fitt av fólki var í b‡num fríggjakvøldi› og leygarkvøldi›, gekk alt serstakliga fri›arliga fyri seg.

- Hetta er eitt av teimum allarfri›arligastu vikuskiftunum eg veit um, sigur s‡slumа›urin í Klaksvík um arbei›sbyr›una um vikuskifti›.

Har hendi púrt einki, sum ikki átti og ta› gjørdi, at løgreglan í næststørsta b‡num í landinum kundi taka sær meira av løttum.

- Skipa› var annars fyri DJ-showi í Klaksvík um vikuskifti›, og fólk var í b‡num bæ›i fríggjakvøldi› og leygarkvøldi›, men ta› gekk fyrimyndarliga væl fyri seg, sigur s‡sluma›urin.

Hann grei›ir frá, at løgreglan var í b‡num og »lúrdi«, sum hann tekur til, men heldur ikki ta› gav nakra orsøk til handtøkur ella naka› minni.

st

Føroyskir kavarar bjó›a seg fram í oljuvinnuni

Jens Kjeld (vm) og Jens Hansen frá felagnum Atlantic Diving fara at bjó›a seg fram í oljuvinnuni, tá leitingararbei›i› byrjar. Samstarv er fingi› í lag vi› altjó›a fyritøku á økinum, sum hevur ney›uga serkunnleikan

Mynd: Jens Kr. Hansen

Felagi› Atlantic Diving, vi› teimum bá›um Jens Hansen og Edvard Kjeld, ger í løtuni sáttmála vi› eitt stórt altjó›a kavarafelag, sum arbei›ir í oljuvinnuni kring allan heimin. Ætlanin er at vera vi› í leitingararbei›num, og føroyingar fáa møguleika at útbúgva seg

OLJUVINNA
Stefan í Skorini

Mánadagin kom Jon Playford frá Oceaneering til Føroyar at undirskriva sáttmálan, sum Atlantic Diving ger vi› stóru altjó›a fyritøkuna Oceaneering. Heimsta›urin hjá Oceaneering í Evropa er í Aberdeen. Annars hevur felagi› høvu›sskrivstovu í USA.

Ætlanin vi› sáttmálanum er, at Atlantic Diving saman vi› Oceaneering kann bjó›a oljufeløgunum, sum fara undir leitingararbei›i vi› Føroyar, eina ROV-tænastu. ROV stendur fyri Remotely Operated Vehicle, sum er ein ómanna›ur fjarst‡rdur undirvatnsbátur. Hesir bátar ver›a ofta n‡ttir til leiting í oljuvinnuni, tá botnurin skal kannast.

Vi› hesum hevur Atlantic Diving tiki› fyrsta stigi› út í oljuvinnuna, og ta› ver›ur føroyska felagi›, sum skal standa fyri uppgávunum í føroyskum øki.

Orsøkin, til at samarbei›i er fingi› í lag vi› Oceaneering, er, at felagi› hevur tann ney›uga serkunnleikan á økinum. Felagi› skal eisini vera veitari av útger› hjá Atlantic Diving, tí slík útger› er sera kostna›armikil.

Edvard og Jens ásanna, at ney›uga vitanin ikki er í Føroyum í løtuni, og tí er ney›ugt vi› útlendskum samstarvi.

Innihaldi› í sáttmálanum sn‡r seg bara um karmarnar, sum arbei›ast skal eftir. Her eru bara ábyrgdir og skyldur ásettar. Tá meira ítøkiligar ætlanir liggja á bor›inum, ver›a projektsáttmálar gjørdir.

Ta› er felagi› Nor›con, sum hevur samskipa› samrá›ingarnar, og tær hava eisini eydnast sera væl, siga teir bá›ir. Teir settu seg í samband vi› Oceaneering fyrstu fer› fyri einum lítlum ári sí›ani.

Føroyingar útbúgvast

Edvard Kjeld og Jens Hansen leggja stóran dent á, at føroyingar vera vi› í arbei›num. Tí hava teir eisini fingi› vi› í sáttmálan, at føroyingar kunnu fáa útbúgving sum ROV-pilotar. Hesum fer Jon Playford eisini at grei›a nærri frá, me›an hann er her.

Atlantic Diving skipar tí saman vi› Oceaneering fyri kunnandi fundi á Maskinmeistaraskúlanum t‡skvøldi› kl. 19.30. Her fer Jon Playford at luttaka, og greitt ver›ur frá um møguleikan hjá føroyingum at útbúgva seg sum ROV-pilotar.

Grundskei›i› er seks vikur í einum simulatori í Stavanger í Noregi. Sí›ani ber til at taka fleiri yvirbygningar og útbúgva seg ví›ari.

Tey, sum velja at nema sær útbúgving, fáa møguleika at arbei›a fyri Oceaneering í ø›rum pørtum av heiminum umframt Føroyum. Felagi› arbei›ir í løtuni í Meksiko, Su›ur Amerika, Afrika, í Persaraflógvanum og í Nor›sjónum. Hetta er tí eitt felag, sum arbei›ir kring allan heim.

Í Føroyum ver›ur mest arbeitt um summari›, og tí er møguleikin hjá føroyingum at fara a›rasta›ni at arbei›a í vetrarhálvuni.

Ætlanin er at fara til verka beinanvegin, og teir fyrstu føroysku ROV-pilotarnir skulu vera klárir fyrst í næsta ári.

Bæ›i Edvard Kjeld og Jens Hansen hava veri› kavarar í fleiri ár og hava eisini útbúgving sum kavarar. Eisini hava teir havt kavaraskúla sí›an 1982.

Ongar fyrireikingar

Er ætlanin at geva møguleika til frí- og eftirskúlar? spyr Álvur Kirke í fyrispurningi

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Ikki er teksturin nógvur í vi›merkingunum hjá Álvi Kirke, løgtingsmanni, til fyrispurningin, men hartil er evni› ikki líti› og ikki minni umrá›andi. Álvur Kirke spyr fyrst mentamálará›harran Torbjørn Jacobsen, um ætlanin er at geva møguleika til frí- og eftirskúlar?

Og í seinna spurninginum vil Álvur Kirke hava at vita, nær kann væntast, at fari› ver›ur undir fyrireikingar til frí- og eftirskúlar?

Sambært samgonguskjalinum

Í stuttu vi›merkingunum sigur spyrjarin orsøkina til fyrispurningin vera, at í samgonguskjalinum stendur, at »møguleiki skal vera fyri frí- og eftirskúlum«.

Og Álvur Kirke sigur ví›ari, at hóast meginparturin av valskei›inum er fari› afturum, hevur hann einki hoyrt til nakrar fyrireikingar.

Frank Jensen noktar at gera felags ni›urstø›u:

Ósemja um fundin

Frank Jensen kom fyrrapartin í gjár til landi› vi› flogfarinum hjá Maersk

Mynd: Edvard Joensen

Landsst‡ri› ynskti ítøkilig úrslit burtur úr fundinum vi› Frank Jensen seinnapartin i gjár, men danski løgmálará›harrin nokta›i undan fundinum at gera nakra felags ni›urstø›u eftir fundin

SAMRÁ›INGAR
Ey›un Klakstein

Høgni Hoydal og Frank Jensen vóru ósamdir um endamáli› vi› fundinum, tá teir seinnapartin í gjár skuldu sessast vi› bor›i› í Tinganesi.

Frank Jensen kom til landi› fyrrapartin í gjár, og tá hann var komin til Havnar eina fer› eftir døgur›a, skuldi hann á fund vi› Høgna Hoydal, varaløgmann.

Fundurin var ætla›ur sum fyrireiking til samrá›ingarnar seinnu í vikuni, men á›renn fundin vóru partnir ósamdir um, hvat veruliga endamáli› vi› fundinum var.

Ítøkilig úrslit

Undan fundinum hevur brævaskifti› veri› millum Løgmansskrivstovuna og danska løgmálará›i›, og hetta brævaskifti› sta›festir ósemju millum partarnar. Høgni Hoydal seg›i í bræv til Frank Jensen fríggjadagin, at avtalan, sum landsst‡ri› og danska stjórnin hava gjørt, leggur upp til, at ítøkilig úrslit skuldu spyrjast burtur úr fundinum í gjár. Og hesa avtaluna ætla›i landsst‡ri› at halda seg til.

Leygardagin svara›i danski løgmálará›harrin, Frank Jensen, brævinum hjá Høgna Hoydal.

Í hesum brævi noktar Frank Jensen fyri at gera eina felags ni›urstø›u vi› starvsfelagan eftir fundin.

Sambært Frank Jensen var ætlanin vi› fundinum í gjár ikki at gera nakra semju, men at lætta um samrá›ingarfundin hósdagin.

Avmarka›ar heimildir

Frank Jensen greiddi í brævinum frá, at eingin semja kann gerast um einstøk mál, fyrr enn semja er um øll málini, sum eru vi› í fullveldissamrá›ingunum.

– Tí kann ta› ikki koma upp á tal, at vit í sambandi vi› fundin gera eina felags ni›urstø›u, sta›festi danski løgmálará›harrin í brævinum leygardagin.

Í einum tí›indaskrivi fyrrapartin í gjár harmast landsst‡ri› um, at Frank Jensen hev›i fingi› avmarka›ar heimildir til fundin vi› Høgna Hoydal, men landsst‡ri› ætla›i hóast hetta at royna at fáa ítøkilig úrslit burtur úr fundinum.

Samrá›ingarnar millum Høgna Hoydal og Frank Jensen skuldu eftir ætlan ver›a lidnar um náttúr›atí› í gjárkvøldi›.

Tí›indaskriv

Gamlir Grønir

10. til 12. november ver›ur eitt tiltak á Kambsdali i› nevnist ”Gamlir Grønir”. Hetta er eitt tiltak, sum KFUM Skótarnir í Føroyum skipa fyri. Endamáli› vi› tiltakinum er at savna KFUM skótar, sum møguliga ikki hava veri› virknir í longri tí›. Sjálvandi eru virknir skótar eisini vælkomnir vi› til tiltaki›. Aldursmarki› er sett til at ver›a 25 ár og eldri.

Orsøkin til at virknisnevndin hjá KFUM skótinum er farin undir at fyrireika hetta tiltaki›, sum ikki hevur veri› roynt fyrr, er at nógvir hava skótarnir veri› í gjøgnum tí›irnar. Men sum tí›in gongur, fella nógvir frá. Ein fer at arbei›a, ver›ur giftur og fær børn, og skótalívi› fellur so lí›andi burtur úr gerandisdegnum hjá einum. Men or›ini sum øll tó minnast, og sum vekja nøkur minni, eru or›ini “Einafer› skóti, altí› skóti”. Hetta er ta› sum vit í virknisnevndini vilja sta›festa. Vit vilja geva gomlum skótum møguleikan at savnast og hava ta› hugnaligt saman í skótaanda. Práta saman og minnast gamlar dagar.

Tiltaki› byrjar fríggjakvøld kl.19.00, og endar Sunnudagin eftir døgu›ra. Um fólk møguliga ikki hava so gó›ar stundir til hetta, er møguleiki hjá teimum at koma inn leygardagin, og møguliga eisini fara heim aftur leygarkvøld. Um so er at onkur vil n‡ta hendan møguleika, vera tey vinarliga bi›in um at møta á›renn kl. 10.00.

Vit bjó›a luttakarunum nógvan gó›an mat. Kaffi og te stendur frammi alla tí›ina.

Fríggjakvøldi ver›ur ein kvøldseta, og annars prát og hugni.

Leygardagin ver›a nakrir lættir, men stuttligir aktivitetir. Legubál, prát og hugni.

Sunnudagin fara vit í kirkju, og fari› ver›ur heim eftir døgur›a.

Um tit vilja frætta meir um hettar tiltaki›, kunnu tit venda tykkum til Jóannes J. Østerø.
tlf. 321454
far.tlf. 214054
e-mail: noysi@post.olivant.fo

Vi› skótakvø›u

Virknisnevndin hjá KFUM skótinum í Føroyum